

*Sjósvimjarir á Sørvágsfirði*

MYNDIR: VINJARD MAGNUSSEN

# Sørvágur leypur á bláman

SEINASTU VIKURNAR HEVUR **ÓVANLIGA** NÓGV **LÍV** VERÐI Í **SØRVÁGSFIRÐI**. SØRVINGAR ERU NEVLIGA BYRJAÐIR AT **SVIMJA** Á **SJÓNUM**, OG **NÝSTARTAÐA** FELAGIÐ HEVUR LONGU **86** LIMIR



**ÚTISVIMJING**

**Inna Tørnroos**
inna@sosialurin.fo

Berit Nysted er stigtakari til Sjósvimjararnar í Sørvági. Hon og nakrar vinkonur vóru tær fyrstu at leypa á bláman og síðani er talið bara voksid.

– Nú eru vit 86 limir í Facebookbólkinum og eini 20, sum svimja regluligani, sigur Berit Nysted.

Bryggja er í Bø og tað er har tey fara útí. Summi klintra niður eftir stiganum, onnur hoppa frá brygguni ella ganga tey út frá sandinum

– Nógv halda okkum vera skítsvøk, men tey, ið hava úttala seg soleiðis eru nú fastir svimjarar, sigur Berit.

Ymiskt er hvussu oftani fólk svimja, men summi eru hvönn dag óansæd veður og vind og aldubrot.

Vinjard Magnussen er ein av teimum 4-5 mannfólkunum, sum er við og svimur og hann viðmælur svimjingina á sjónum.



*Berit Nysted er stigtakari til svimjifelagið*

– Man hevur tad SO fantastiskt aftaná, sigur hann.

Berit leggur eisini aftrat at fleiri av sjósvimjarunum hava fingið betri heilsu av at svimja.

## INNIHALD

2 KLUMMAN: **BYGG VAKURT**
4 FACERAPE: **NÓGV KÆRA SÍNA NEYÐ**
6 TIPS: **HJARTALIGUR LÁTUR LEINGIR LÍVIÐ**
8 90 SEKUND **VIÐ HERA EYSTURLÍÐ**
10 KLØN OG LUKKULIG.. **ELLA?**
12 BYRJAÐI HANDIL **Í RINGASTU KREPPUTÍÐ**
14 **SKEMT**, KLUMMAN HJÁ HØGNA DJURHUUS
16 ÚTISKÚLI: **HETTA ER GENIALT**
20 LIST Í ALMENNA RÚMINUM: **VAKNA RØDDIR Í STEINI**
24 POLITISKA STØAN: **Á BREDDAN KOMA NÚ POLITISKAR NÝSKIPANIR**
26 KAPPINGARSÍÐAN
28 MIÐLAMJARR
31 TAÐ HENDIR
32 VIKUMYNDIN

**KLUMMAN**



*Randi Jacobsen*

# Bygg vakurt!

Útsýnið úr stovuvindeygu mínum í Havn er heilt einastandandi.

Eg síggi niðan til Hoyvíkar, ein part av Eysturoynni, Nólsoynna og út í Havn eystureftir. Eg síggi fleiri fitt og vøkur hús og eitt petti av deiliga fríøkinum niðan fyri Svartafoss.

Men minni vakurt er útsýnið, um eg flytið eyguni yvir á handilsøkið hinu megin Ítróttarhøllina á Hálsi. Har eru nøkur fáa vøkur hús, men meginparturin av kassunum eru so ljótir, at tað krevur hugflog at byggja so ljótt. Hví í verðini varð í sínari tíð loyvi givið til at reisa so ljót hús, sum standa har og misprýða býin?

Loyvt man tað vera, tí tað skjóta framvegis andskræmiliga ljótir bygningar upp kring landið. Eg fái ilt í eyguni av at líta á hesi stóru, ófantaligu og ósjarmerandi hús.

Vit hava reglur fyri eitt og annað. Hví ikki hava reglur um, at bygningar skulu lúka ávís krøv viðvíkjandi vakurleika? Tað hevði verið mennandi fyri byggivinnuna og gott fyri borgrararnar og umhvørvið. Kommunur hava umhvørvisleiðarar, sum kundu havt ein fingur við í spælinum, tá ið byggiloyvi verða givin.

Samstundis kundi verið pyntað eitt sindur upp á ljótu húsini við at sett fólk við ansi fyri litum at skipað so fyri, at andstyggiligu kassarnir verða málaðir, tí neyvan verða kassarnir tiknir niður, uttan so at blámusoppurin ger av við teir.



VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Karin Meyer / Álvur Haraldsen